# Vónrík vágafólk vænta vinning

**At vágafólk vænta sær nógv av undirsjóvartunlinum, kom týðuliga til sjóndar á fundi, sum Vága Vinnufelag skipaði fyri mánakvøldið. Mestsum bara bjartskygni var at hoyra frá teimum, sum tóku orðið á fundinum**

VINNUFUNDUR
*Edvard Joensen*

Miðvági: Regluligari útflutning. Fleiri inntøkur til ferðavinnuna, og lívligari handilslív í oynni, er nakað av tí, vágafólk vænta sær, tá undirsjóvartunnilin komandi vetur verður tikin alment í nýtslu.

Vága Vinnufelag skipaði mánakvøldið fyri almennum fundi í bygdarskúlanum í Miðvági. Undirtøkan millum oyggjarfólkið var heilt góð, og eingin var í iva um, at bjartskygni ræður í Vágum, nú fasta sambandið er komið so væl áleiðis.

Fundurin var skipaður sum pallborðsfundur, har fólk frá ymsu vinnugreinunum, eins og umboð fyri Felagskommununa í Vágum, sótu við pallborðið. Eisini hevði Vinnufelagið fingið professaran í fólkalívsfrøði, sørvingin Jóan Paula Joensen, at koma á fundin at hugleiða um, hvørja ávirkan tunnilin kann fara at fáa, eins og hann eisini tók aftur í tíðina og vísti á, hvussu mynstrið er broytt upp gjøgnum søguna.



*Tað var bjartskygni við pallborðið í Vágum mánakvøldið, og fólk høvdu nógv uppskot um, hvussu og hvat fáast skal burtur úr teimum møguleikum, undirsjóvartunnilin fer at geva oynni*

*Mynd: Edvard Joensen*

## Báðar vegir

Tað bjartskygnið, sum ræður í vinnuni í Vágum, er í fleiri førum grundað á, at framleiðslan frá virkjunum í oynni sleppur skjótari út á marknaðin.

Tann regluligi flutningurin, sum verður møguligur, tá ikki skal bíðast eftir ferjuni, fer at gera tað bæði lættari og bíligari hjá vinnuni at arbeiða, helt stjórin á niðursjóvingarvirkinum Kovanum í Sandavági, Ari Thomasen.

– Tað verður lættari at fáa rávøruna vestur, og tað verður eisini nógv lættari at fáa lidnu vøruna burtur aftur, tá ein ikki skal ganga við nervum fyri, um nú pláss er við ferjuni júst tann túrin, sum passar til fráferðina hjá farmaskipinum, sum liggur í Havn á veg til europeiska marknaðin, vísti hann á.

Hann fegnaðist um, at nú kunnu virkini í Vágum fara at arbeiða eftir egnum tørvi heldur enn eftir ferðaætlanini hjá Strandferðsluni.

Tó vísti hann á, at ein vansi við tunlinum kann sjálvandi gerast, at lættari verður at flyta arbeiðsmegina av oynni, nú lætt verður at ferðast til og frá. Men hann uggaði seg tó í sama andadrátti við, at tað verður eisini lættari at flyta arbeiðsmegi vestur í Vágar, hóast fólk búgva í meginøkinum.

Eisini leiðarin í timburhandlinum í Sørvági vísti á, at ferðslan kann vera báðar vegir, og at tað ikki er neyðugt at vera bangin fyri, at alt handilslív fer av oynni, hóast fast samband er.

– Vit hoyra ofta hetta, at fólk so bara fer til Havnar at keypa, segði Martin Nielsen. Men hava vit kappingarførar prísir, góða vøru og tænastu, ivist eg ikki í, at tað ber til at reka handil í Vágum. Kanningar vísa, at prísleganen er ikki hægri hjá okkum enn aðrastaðni, vísti hann á.

## Tilboðini

Formaðurin í Felagskommunini í Vágum, Jónhild Jørgensen, vísti á, at tað er alneyðugt, at kommunurnar í oynni eru klárar at taka í móti teimum avbjóðingum, undirsjóvartunnilin fer at seta teimum.

– Hugsast skal um, segði Jónhild Jørgensen, at ferðslan skal ikki bara ganga av oynni, men so sanniliga eisini hendanveg. Vit skulu hava fólk vestur at búgva, og so mugu vit hava nakað at bjóða teimum. Umframt bústaðarmøguleikar stendur barnaansing altíð sera frammalaga, tá fólk hugsa um at seta búgv, vísti hon á.

Hon legði upp til, at ferðavinnan í Vágum fær betri umstøður at arbeiða undir, og at eitt nú Kunningarstovan kundi verið samskipari fyri ymsum tiltøkum, sum verða skulu í oynni.

Og tað er júst tað, ferðavinnan sjálv vil sleppa, segði formaðurin fyri Ferðavinnuna í Vágum, Niels Olgar Joensen.

Vinnan er við at gera eitt uppskot um, hvussu hetta kann gerast, men tað krevur munandi betri umstøður til Kunningarstovuna, enn tær, sum nú eru. Hann vísti á, at ein møguleiki hevði verið, at kommunurnar lótu beinleiðis stuðul til Kunningarstovuna.

Hann fegnaðist eisini um undirsjóvartunnilin, og segði seg síggja stórar møguleikar í ferðavinnuni, nú fast samband verður. Millum annað vísti hann á, at lættari verður at fáa bussar við fólki frá eitt nú stóru ferðamannaskipunum, sum vanliga koma til Havnar, vestur í Vágar.

Breið semja tóktist vera á fundinum um, at Kunningarstovan eigur at virka sum samskipari hjá bæði ferðavinnu, handli og mentanarlívi í oynni.

## Lívligt orðaskifti

Eftir pallborðið var orðið frítt, og nógv nýttu møguleikan at siga sína hugsan og koma við góðum hugskotum um, hvussu sum best skal fáast burtur úr teimum møguleikum, undirsjóvartunnilin gevur.

Onkur vísti á, at tað kann gerast ein vansi við ferðsluni gjøgnum bygdirnar, tá tunnilin letur upp, tí ferðslan fer at økjast munandi.

Víst varð í tí sambandinum á, at tað gongur í so seint við tí arbeiði, sum longu er farið í gongd fyri at betra um ferðslutrygdina.

Hetta fekk summi handilsfólk at bera fram, at skeltingin í Vágum er ikki nóg góð. Til dømis tóktist vónleyst hjá handlum í bygdunum at fáa sett skelti upp við landsvegirnar, har víst verður til ymsu handlarnar.

Sama neyðin er við farleiðini til Mykinesar, vísti leiðarin á Kunningarstovuni í Vágum á. Fremmandafólk, sum koma til Sørvágs, hava ikki hóming av, hvar Súlan er at finna, um ikki onkur staðkendur forbarmar seg yvir tey og vísir teimum á bátin.

Í samband við tosið um ferðslu og ferðslutrygd varð víst á uppskot um at gera tunnil av Fútakletti í Vatnsoyrar fyri at beina ferðsluna burtur frá Sandavági og Miðvági.

Men hesum uppskotinum tóku handilsfólk í bygdunum ikki undir við. Tað fer bara at gera, at als eingin kemur til bygdirnar yvirhøvur, og tann møguleiki, sum eigur at vera við at fáa fremmandafólk at brúka handlarnar í Vágum, dettur burtur, tá fólk sum ferðast til og frá, bara koyrir gjøgnum fjøllini og ongantíð sær bygdirnar.

Sum dømi um hetta vísti ein handilskvinna á Kvívík, sum koyrt verður fram við dagliga. Tú hyggur oman yvir bygdina og staðfestir, at har liggur ein vøkur bygd. Og tað er so tað.

– Tað má ikki verða soleiðis, fólk fer at ferðast í Vágum, tá tunnilin er komin, helt hon.



*Heilt væl av fólki varð møtt til fundin, sum Vága Vinnufelag skipaði fyri í Miðvági*

*Mynd: Edvard Joensen*



Tryggingarfelagið Føroyar:

# Ójøvn kapping á tryggingarmarknaðinum

**– Nú monopolið er avtikið, kanst tú spyrja, um vit ikki ístaðin hava fingið eina ójavna kapping millum almenna bankan og privata virksemið, sigur Jógvan Durhuus, fyrrverandi formaður fyri Tryggingarfelagið Føroyar**

TRYGGING
*Heri á Rógvi*



*Jógvan Durhuus, fyrrverandi formaður í Tryggingarfelagnum Føroyum, helt vegna nevndina røðu á aðalfundinum herfyri.*

*Mynd: Finnur Justinussen.*

Tá Tryggingarfelagið Føroyar fyri góðari viku síðani hevði aðalfund, so segði táverandi formaðurin, Jógvan Durhuus, frá frásøgn nevndarinnar fyri 2001.

Hann greiddi frá teimum ymsu pørtunum av virkseminum hjá Tryggingarfelagnum, sum hevði eitt yvirskot fyri sjálvt tryggingarvirksemið fyri 2001 og eisini yvirskot á fíggjarpostum, soleiðis at samlaða yvirskotið gjørdist 44,6 mió. kr. í yvirskoti eftir skatt.

– Nú monopolið er avtikið, kanst tú spyrja, um vit ikki ístaðin hava fingið eina ójavna kapping millum almenna bankan og privata virksemið, sigur Jógvan Durhuus í nevndarfrásøgnini.

## Kapping og tó

Tað skilst, at Jógvan Durhuus ikki heldur nakað um kappingina frá almenna bankanum. Hann heldur ikki, at bankin hevur sett nøkur avkastkrøv til sína íløgu.

– Tað er at fegnast um, at kapping hevur tikið seg upp innan tryggingarvinnuna. Og kappingin við almenna bankan er eisini rættiliga hørð. Tað tykist tó, sum um almenni bankin ikki hevur sett nøkur avkastkrøv til sína íløgu í trygging. Í fjør kostaði tryggingarvirksemið almenna bankanum 4-5 mió. kr., og samanlagt hevur íløgan í tryggingarvirksemið kostað almenna bankanum uml. 25 mió. kr.

Hetta má vera undrinarvert, serliga í hesum tíðum, tá so nógv verður skrivað og tosað um burðardyggar verkætlanir, stendur at lesa í nevndarfrágreiðingini.

Í nevndini tá sótu Jógvan Durhuus, Trygvi F. Guttesen, Birgir Mohr, Jógvan Lützen, Arngerð Persson, Ronald Poulsen, Anna Maria Simonsen, Emil Simonsen og Jákup Sólstein.

Á eykaaðalfundi, ið varð hildin beint eftir aðalfundin, stóðu nakrir nevndarlimir fyri valið, og endin gjørdist, at Jógvan Durhuus ikki varð afturvaldur. Nýggjur í nevndini er Jan Müller.

Jógvan Durhuus sigur, at tað altíð er keðiligt at ikki verða valdur, tá ein stillar upp. Hann hevur verið í nevndini – fyrst Tryggingarsambandinum – síðani 1980. Hann er framvegis limur í umboðsráðnum í tvey ár afturat.

## Gott ár

Annars kundi nevndin í Tryggingarfelagnum fegnast um, at teir hava fingið yvirskot innan sjálvt tryggingarvirksemið.

Orsakað av m.a. 11. sept. og partabrævamarknaðum úti í heimi gjørdist árið ikki so gott sum undanfarið alt í alt, men teir fegnast serliga um, at sjálvt tryggingarvirksemið gav yvirskot.

## Dumpa ikki

Beint áðrenn evstamark fingu vit hendur á Gunnar í Liða, forstjóra í Tryggingarfelagnum Føroyar.

– Vit fylgja marknaðinum, og hetta eru vit eisini førir fyri, men vit dumpa ikki prísirnar, sigur Gunnar í Liða.

## Tingfundur hósdagin

Edmund Joensen, løgtingsformaður, hevur eftir áheitan valt at útseta lýsa tingfundin, sum skuldi verið týsdagin til hósdagin. Tað vóru flokkarnir við samráðingarborðið á Gamla apoteki, ið gjørdu av at biðja um at fáa útsett tingfundin.

Edmund Joensen hevur síðani gjørt av, at tingfundurin verður hósdagin kl. 13.30.

Skráin fyri fundin:
1. Val av nevndum, umrøddar í § 24 í tingskipanini.
2. Val av umboðum í Norðurlandaráðið.
3. Val av umboðum í Útnorðurráðið.
4. Val av løgtingsgrannskoðarum.
5. Val av 4 limum og 4 varalimum í lokalnevndina eftir rættargangslógini § 115, stk. 2.
6. Tilnevning av tveimum umboðum í eftirlitið við varðhaldsfangum eftir rættargangslógini § 779.
7. Val av nevningagrundlistanevndum.
8. Framløga.

***- HR***

Jørn Astrup Hansen:

# Eingin vandi

**– Tað er eingin vandi fyri, at Føroya Banki yvir longri tíð skuldi givið Tryggingarfelagnum ella øðrum óreiðiliga kapping. Hesum vil kravið hjá eigarunum um avkast syrgja fyri, sigur Jørn Astrup Hansen, forstjóri í Føroya Banka, sum heldur vil seta spurnartekin við leiklutin hjá Tryggingarfelagnum Føroyum**

TRYGGING
*Heri á Rógvi*



*– Tað er eingin vandi fyri, at Føroya Banki yvir longri tíð skuldi givið Tryggingarfelagnum ella øðrum óreiðiliga kapping. Hesum vil kravið hjá eigarunum um avkast syrgja fyri, sigur Jørn Astrup Hansen.*

*Mynd: Jens Kristian Vang.*

Orðingarnar í nevndarfrágreiðingini hjá Tryggingarfelagnum Føroyum fáa ikki beinleiðis afturljóð frá Jørn Astrup Hansen, forstjóra í Føroya Banka.

Hann er ógvuliga ósamdur við orðingarnar í frágreiðingini.

– Tað er eingin vandi fyri, at Føroya Banki yvir longri tíð skuldi givið Tryggingarfelagnum ella øðrum óreiðiliga kapping. Hesum vil kravið hjá eigarunum um avkast syrgja fyri, sigur Jørn Astrup Hansen.

Í nevndarfrágreiðingini fegnast nevndin í Tryggingarfelagnum eisini um, at kapping er komin á marknaðinum.

– Henda gleðin er tó valla serliga djúp. So seint sum í ár 2000, tá Tryggingarfelagið Føroyar hevði eitt undirskot áljóðandi 16 mió. kr. fyri tryggingarvirksemið, staðfesti nevndin í frágreiðing sínari, at Tryggingarfelagið er til reiðar at fasthalda núverandi – ov lágu – tryggingargjøldini, so leingi tað er neyðugt.

Tryggingarfelagið Føroyar segði sostatt, at teir vóru til reiðar til at nýta partar av teirra inntøkum frá teirra stóru eginogn til at dumpa prísin á tryggingargjøldum, til møguligir kappingarneytar høvdu upptikið at kappast við teir.

## Reiðilig kapping

Sum nevnt heldur Jørn Astrup Hansen ikki, at luttøku hjá Føroya Banka við Trygd við føra til óreiðiliga kapping á tryggingarmarknaðinum. Hann vísir serstakliga á tað, at Føroya Banki hevur eina skyldu yvir fyri sínum eigarum, sum hava atgongd til eginpeningin, t.e. teir kunnu krevja eitt avkast við m.a. at fáa útgoldið vinningsbýti. Hetta ger sseg tó ikki galdandi hjá Tryggingarfelagnum Føroyar, sum ikki skal standa til svars fyri sínum eigarum.

–Tryggingarfelagið Føroyar hevur eina eginogn, ið er næstan fýra ferðir so stór sum hjá donskum tryggingarfyritøkum, sum virka undir líknandi lógum og reglum. Tað er reelt ikki nakar eigari av hesari eginognini – eingin veit í øllum førum, hvør tað er – og tað er sostatt eingin, ið setir krøv til Tryggingarfelagsins leiðslu um eitt kappingarført avkast av eginognini, sigur Jørn Astrup Hansen.

Útfrá hesum er tað undarligt at hoyra nevnd Tryggingarfelagsins lýsa seg sum eina privata fyritøku. Tryggingar líkist í øllum førum teirri almennu fyritøkuni, harímóti Føroya Banki í øllum førum virkar eftir privatum búskaparreglum, sigur Jørn Astrup Hansen.

Samstundis vísir hann á, teir ikki reka tryggingarvirksemi í Føroya Banka, men Trygd. sum er eitt partafelag, ið bankin eigur.

– Føroya Banki er yvir fyri sínum partaeigarum ábyrgdaður til at hava kappingarført avkast av eginognini. Í 2001 rentaði Føroya Banki sína eginogn við 15,8% áðrenn skatt. Til samanberingar rentaði Tryggingarfelagið Føroyar í 2001 sína eginogn við einans 4,6%. Í mun til Føroya Banki eru teir aftanfyri við 130 mió. kr, sigur Jørn Astrup Hansen.

– Tann kostnaðurin, sum er tengdur royndunum hjá Trygd at vinna sæti á marknaðinum, er mestur ikki óvanligar. Serliga ikki, tá tú tekur kappingarstøðuna við í metingarnar, sigur Jørn Astrup Hansen.

Hann leggur dent á, at Trygd nokk hevur ráð til at gjalda kostnaðin, men at Føroya Banki sum partaeigari sjálvandi er munandi áhugaður í, at íløgan í Trygd kemur at hvíla í sær sjálvum.

Jørn Astrup Hansen leggur afturat, at tó so at myndugleikarnir í 1997 avtóku tryggingarmonopolið, fyri at lata upp fyri kapping á tryggingarmarknaðinum, so hava myndugleikarnir við at frígeva tann stóra kapital, sum Tryggingarsambandið hevur savnað saman í tíðini við lógarfestum monopoli, gjørt tað munandi verri hjá nýggjum luttakarum á marknaðinum.